# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Miðlafelagið eigur allan Sosialin

**Í gjár skrivaðu P/F Miðlafelagið og P/F Føroya Tele undir avtalu, har Miðlafelagið keypir seinastu 34% av partapeninginum í Sp/f Sosialinum og Sp/f Húsinum**

FJØLMIÐLAR
*Tíðindaskriv*

Við hesum er Miðlafelagið einasti eigari av teimum báðum fyritøkunum.

P/F Miðlafelagið, sum leiðsla og starvsfólk á Sosialinum eiga, keypti fyri tveimum árum síðani allan partapeningin í fyritøkunum frá Javnaðarflokkinum, og seldi síðani 34% av fyritøkunum til Føroya Tele, sum Sosialurin eisini undan hesum samstarvaði við.

- Samstarvið við Føroya Tele hevur riggað sera væl, og samstarvið um portalin heldur fram. Føroya Tele metir ikki, at ein aktivur eigaraskapur hevur avgerandi týdning fyri samstarvið, og við teimum fortreytunum var tað upplagt, at vit fóru í samráðingar við Føroya Tele um at keypa seinastu 34% av fyritøkunum, sigur Jan Müller, forstjóri í Sosialinum.

- Sosialurin er ein spennandi miðlafyritøka, sum hevur ment seg nógv. Men vit mugu ásanna, at fyritøkan ikki er partur av kjarnuøkjunum hjá okkum, og tí er tað ikki eitt endamál í sjálvum sær at eiga í fyritøkuni. Men sum ein framtíðar KST-fyritøka er tað týdningarmikið hjá Føroya Tele at hava samstarv við eina miðlafyritøku, sigur Kristian Davidsen.

Samtakið, sum Miðlafelagið fevnir um, eru Sp/f Sosialurin, Sp/f Húsið sum eigur part í Prentmiðstøðini og P/F Miðlavarpið, sum rekur Rás2. Samtakið rekur fjølmiðlavirksemi á fleiri miðlapallum. Herundir blaðútgávu, útvarp og netmiðlar.



*Kristian Davidsen, stjóri í Føroya Tele, og Jákup Mørk, stjóri í Miðlafelagnum, skriva undir avtaluna, sum ger Miðlafelagið til einsamallan eigara av Sosialinum*


